# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tey konservativu skulu hava eitt oddavalevni til ES-tingið. Bendt Bendtsen er eitt gott boð*

*(Hans Engell)*

# Illveður og ruðuleiki í New York

**Nógvar gøtur stóðu undir í vatni, og trø fóru um koll, tá eitt ógvusligt toruveður herjaði New York**

New York-búgvar fingu eina heldur harðliga dagsbyrjan í gjár, tá toru-sláttur, stormur og grimdar-regn herjaðu býin, júst sum fólk skuldu til arbeiðis.

Kloakkirnar kláraðu ikki at taka ímóti tí nógva regn-inum, so nógvar gøtut stóðu undir í vatni, og støðan var tann sama á fleiri tok- og undirgrundarstøðum. Sam-ferðslan var tí nógv darvað, so fólk noyddust at fara til gongu ella at taka egnan bil ella bussin til arbeiðis. Tað elvdi til nógva bilferðslu, og tá fleiri av gøtunum stóðu undir í vatni, var alt í einum ruðuleika, skrivar New York Times.

Á einum tíðindafundi í gjárkvøldið segði Michael Bloomberg, borgarstjóri, at illveðrið hevði kravt eitt mannalív, og at fleiri fólk høvdu fingið skaða. Mynd-ugleikarnir søgdu seinni, at fleiri hús hava fingið so stóran skaða, at tey verða ikki gjørd aftur.



*Ein av gøtunum í New York aftan á grimdarregnið í gjár*

## STUTT SAGT

### Aftur til pólin

Russar ætla sær av álvara at leggja dent á, at teir kanna sær ognarrættin til havbotnin og undir-grundina við Norðpólin. Herfyri settu russar eitt flagg á havbotnin undir pólinum, og nú ætla teir at gera eina kanningarferð til póløkið í november. Við á ferðini verða jarðfrøðingar, sum skulu royna at staðfesta, at undirgrundin við Norð-pólin hevur samband við russiska landgrunnin. Kanada, USA, Noreg og Danmark halda seg eisini hava rætt til økið við Norðpólin.

### Stór alda

Tólv fólk hvurvu, tá ein risastór alda brádliga skolaði inn á vestur-strondina í Algeria sein-asta fríggjadag. Alger-isku myndugleikarnir duga ikki at siga, hví hendan eina aldan var so óvanliga stór, men summir serfrøðingar hal-da, at hon kundi stava frá onkrari royndar-spreinging í Miðjarðar-havinum. Ein talsmaður hjá kanningarstovninum CRAAG sigur, at bæði Frakland, Spania og Italia hava royndar-spreingingar í Miðjarðar-havinum av og á.

### Minnast brotsverk

Í gjár reistu russiskir prestar ein tólv metrar høgan kross á einum staði sunnan fyri Moskva, har loyniliga løgreglan hjá einaræðis-harranum Stalin plagdi at avrætta politiskar andstøðingar og onnur. Í ár eru 70 ár liðin, síðani Stalin fullførdi sínar útreinsingar, og í tí sam-bandi verður skipað fyri fleiri tiltøkum í Russlandi í ár. Millum annað er ætlanin at reisa fleiri minnisvarðar ymsastaðni í landinum.

### Funnu gosfjall á Reykjanes-rygginum

Íslendskir jarðfrøðingar funnu eitt eldfjall á hav-botninum á Reykjanes-rygginum, tá teir fyrr í summar vóru á rannsók-narferð har. Morgun-blaðið skrivar, at jarð-frøðingarnir hava ikki fingið so áhugaverdar upplýsingar seinastu 40 árini sum í summar, og úrslitunum fyri at takka kunnu teir nú lýsa íslendsku jarðfrøðisøg-una 24 milliónir ár aftur í tíðina, skrivar blaðið.

# Bendtsen á veg út

**Alt bendir á, at Konservativi Fólkaflokkurin í Danmark skal hava nýggjan formann fyri Bendt Bendtsen**



*Bendt Bendtsen fer ætlandi at leggja frá sær sum floksformaður*

Teir seinastu mánaðarnar hava danskir fjølmiðlar við jøvnum millumbili havt á máli, at formansskifti var á veg í tí minna stjórnar-flokkinum, og nú sigur fyrrverandi konservativi ráðharrin Hans Engell við Fyens Stiftstidende, at for-mansskiftið er í hondum.

Hans Engell vísir á, at í seinastuni hava konservativu ráðharrarnir Lene Espersen og Brian Mikkelsen verið sera virknir, meðan lítið og einki er at hoyra frá Bendt Bendtsen. Eitt nú var tað Brian Mikkelsen, sum beint fyri summarfrítíðina sam-ráddist vegna Konservativa Fólkaflokkin um ymisk búskapartiltøk, sjálvt um Bendt Bendtsen umsitur júst búskaparmál í stjórn-ini.

Hóast Brian Mikkelsen hevur verið nógv frammi í seinastuni, so er tað ikki serliga sannlíkt, at hann verður formaður hjá teim-um konservativu eftir Bendt Bendtsen. Løgmálaráðharr-in, Lene Espersen, verður hildin at vera tað besta boðið, og umhvørvismála-ráðharrin, Connie Hede-gaard, kann vera eitt annað boð.